# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Gunda Djurholm**
Kollafjørður

andaðist og varð jarðað.
Takk fyri kransar, blómur og heilsanir. Takk til øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina. Takk til missiónshúsið í Kollafirði. Takk til Eldrasambýlið í Kollafirði og Tjarnargarð fyri hjartaliga umsorgan. Takk til starvsfólkini á G4 og Berg D. Joensen, prest, fyri vitjanir og troystarrík orð í kapellinum og kirkjuni.
Tøkk til øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Niels Pauli**
**Ingrid, Arnóra, Hans og Bjarni**

**Dagurin**
**2. februar. Kyndilsmessa**. Er upprunaliga ein mariumessa og varð hildin til minnis um vitjan Mariu í halgidóminum 40 dagar eftir føðingina, sum siður var hjá jødiskum konum. Henni til minnis og barninum til heiðurs vórðu kertur og kyndlar tendraði, og av tí kemur navnið missa candelarum. Navnið candela merkir vaksljós. Victor Danielsen doyði hendan dagin í 1961.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Fimleikagentur í 1933



Myndin er frá realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her eru fimleikagentur frá umleið 1933.
Genturnar eru f.v.: Inger Højgaard, Ása Christiansen (Michelsen) og Gunnvør Dal-Christiansen.
Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024.
(mynd nr. 50)

*Myndaeigari: Ása Michelsen*

Fyri 20 árum síðan:

# Næstan hundrað dekk skorin upp

Hósdagin 2. februar 1989 skrivar tíðindablaðið Sosialurin um eitt rættarmál móti einum 20 ára gomlum manni, sum saman við tveimum øðrum 16 og 17 ára gomlum dreingjum vóru skuldsettir fyri herverk á hálvthundrað bilar, umframt herverk móti handlinum Spíruni í Sverrisgøtu í Havn.

Í hesum sambandi bað løgreglan bileigararnar, sum høvdu boðað frá herverki á teirra bilar, um at siga frá hvussu nógv hetta kom at kosta. Tað vísti seg at 94 dekk vóru skorin upp umframt rútar, spegl og antennur. Endurgjaldskravið var fyribils mett til væl oman fyri 100.000 krónur.

Eisini skrivar blaðið um at mikunáttina vóru tvey innbrot í Havn. Annað var hjá Berg Motors á Hálsi, har pengar vóru tiknir, og hitt var í kioskini Aldubáruni í J.C. Svabosgøtu, har eingir pengar vóru tiknir, tí pengakassin var tómur.



*Á summum bilum vóru øll dekkini skorin. Tilsamans 94 dekk vóru skorin*



tíðindablaðið
sosialurin
Nr. 14 ★ hósdagur 2. februar 1989 62. árg. ★ Kr. 6,00



*Innbrot var í kioskina Aldubáruna í J.C. Svabosgøtu. Tað innbrotið hevði eingi við hitt málið um skornu dekkini at gera*

## Rætting



Í vikuskiftisblaðnum skrivaðu vit um amerikanska sangaran George Beverly Shea, sum fylti 100 ár 1. februar. Í greinini stóð, at hann var føddur 9. januar 1909. Tað er sjálvandi ikki rætt. Hann varð føddur 1. februar 1909.
*-red*